# Hongd út sum pervers svín á Facebook



*Tonny Olsen og Frank Robertson á Tvøroyri eru heilt ólukkulig, tí tey eru alment løgd undir at hava misbrúkt internetið upp á tað grovasta til at vera skendsk og ónærislig ímóti hvørjum øðrum. Tey hava nú meldað, tí tey vilja verða reinsað*

**Tvey fólk á Tvøroyri hava merkt á sínum egna kroppi, hvussu hættisligt tað kann verða at leggja upplýsingar um seg sjálvan vælumtóktar heimasíður á internetinum. Nú eru tey hongd út sum pervers svín á Facebook**

INTERNETIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hesum finna vit okkum ikki í og vit vilja verða reinsað.

Tonny Olsen og Frank Robertson á Tvøroyri føla seg bæði úthongd og misbrúkt á internetinum.

Og tey noyðast samstundis at ásanna, hvussu hættisligt tað kann vera at leggja upplýsingar um seg sjálvi á teimum ógvuliga væl dámdu sosialu internetsíðunum sum Facebook og øðrum líknandi heimasíðum, har fólk í milliónatali hittast og skriva um seg sjálvan-og onnur.

Og tey hava eisini merkt á egnum kroppi, hvussu hættisligt tað kann vera at lata onnur sleppa at læna telduna.

Tey bæði eru systkinabørn og nú eru tey úthongd á Facebook fyri at vera pervers svín í einum internetmisbrúki, sum fevnir um fleiri fólk.

## Alment úthongd

Tonny Olsen sigur, at hon fekk ein skelk, tá ið systir hennara kom á arbeiðspláss hennara eftir henni og fortaldi henni, at bæði hon og Frank Robertson vóru alment skuldsett á internetinum fyri at hava sent ógvuliga ónærislig teldubrøv við grovum seksuellum og øðrum ómetaliga særandi og skendskum innihaldi til ávís onnur, sum eisini eru á Facebook.

Fyri at gera ilt verri, varð mynd av teimum løgd við skuldsetingunum fyri at ongin skuldi ivast í, hvønn talan var um.

Men hetta vilja Tonny Olsen og Frank Robertson onki kennast við og tey vilja verða reinsað.

Fyri at kunna samskifta á Facebook, skal mann vera skrásettir sum vinir.

- Men vit eru ikki vinir við tann, sum hevur fingið hesar ódámligu brøvini og tí kunnu vit heldur ikki hava sent tey, siga tey bæði.

## Lænti telduna

Men tilburðurin er meldaður til løgregluna, sum kannar málið.

Og eftir, hvat tey hava fingið upplýst, eru hesi ódámligu brøvini sporað aftur til teldur hjá teimum.

Men tey tvíhalda um, at tey kenna onki til hetta.

Tað einasta, tey kunnu koma í tankar um, er, at tey hava lænt einum vinfólki telduna og tey vita, at hetta vinfólkið er vinur við tann, sum hevur fingið hesar ódámligu brøvini.

- Vit læntu telduna út tí vinfólkið greiddi frá, at teldan var brotin og vildi bara læna okkara teldu til okkurt smáttarí og tað eftirlíkaðu.

Síðani hevur sama vinfólk lænt telduna fleiri ferðir.

Tey hava illgruna um, at tað er soleiðis, at hesi ódámligu brøvini eru send frá teirra teldu.

- Sjálvandi eigur mann at vera varin við at læna øðrum telduna, men vit gjørdu tað í hesum føri, uttan at hugsa um tað, tí talan er um fólk, vit kenna væl og sum vit hava havt álit á, siga tey.

Tað hevur ikki eydnast teimum at fáa fatur á hesum vinfólkinum aftur, men nú vóna tey bara, at løgreglan kemur til botn í málinum, so at tey kunnu verða reinsað.

# Misbrúkarar hava lætt spæl

**Kriminalløgreglan í Føroyum kannar í løtuni eitt mál um ónærisligan atburð á internetinum. Tey, sum vilja misbrúka internetið og fartelefonir til barnaporno ella til at verða skendsk og ónærislig ímóti hvørjum øðrum, hava lætt spæl, staðfestir Per Skov Christensen, kriminalpolitistur**



*Per Skov Christensen hjá kriminalløgregluni í Føroyum sigur, at tað er ógvuliga umráðandi at fólk ansa sera væl eftir telduni og, hvør sleppur at brúka hana, tí annars er lætt at koma undir illgruna fyri at misbrúka internetið*

INTERNET MISBRÚK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tey, sum vilja misbrúka internetið og fartelefonir til at verða skendsk og ónærislig ímóti øðrum, hava lætt spæl.

Tað staðfestir Per Skov Christensen hjá kriminalløgregluni í Føroyum.

Hann sigur, at í løtuni kannar løgreglan eitt mál um skendskan og ónærisligan atburð á internetinum.

Talan er um upplýsingar, sum eru lagdir út á eina sera vælumtókta og væl vitjaða, sosiala heimasíðu. Onkur hevur tikið sær hesar upplýsingar so nær, at viðkomandi hevur meldað.

Men av tí, at talan er um eitt mál, sum er undir kanning, við løgreglumaðurin onki upplýsa um málið annars.

Umframt hetta, er eitt mál til viðgerar í Føroya Rætti um misbrúk á internetinum, har ein ung genta følir seg úthongda, tí onkur hevur lagt nærgangandi myndir av henni á eina almenna internetsíðu.

Men at løgreglan ikki hevur so nógv mál av hesum slagnum til kanningar, er ikki neyðturvuliga bara tí, at øll skikka sær so væl.

- Nógvar av hesum sosialu heimasíðunum á internetinum eru lutfalsligar nýggjar og tað kann vera, at løgreglan fer meiri at gera á hesum øki, sum tíðin gongur, heldur hann.

Per Skov Christensen sigur, at ein trupulleiki er at áseta eitt mark fyri, hvat ein kann loyva sær at leggja út á internetið av teksti um onnur.

- Tað kann vera ringt at seta mark fyri, nær tað blívur ov groft og nær tað gongur fólki ov nær.

- Ofta byrjar hetta spakuliga, men so verður tónin grovari og grovari, til tað einaferð gongur onkrum so nær, at tey melda.

## Forða fyri misbrúki

Men hann sigur, at ein heilt annar trupulleiki er, at tað ber eisini til at fara á ymsar sosialar internetsíður undir følskum navni.

-Tað er ikki ókent, at barnalokkarar brúka hendan háttin fyri at koma í samband við børn undir følskum navni.

Hinvegin ber tað væl til at finna út av, hvørjari teldu, ein ávísur tekstur er sendur frá.

- Her stingur so tann trupulleikin seg upp, at ein telda er sjáldan heilt persónlig, tí tað eru oftast fleiri fólk, sum brúka somu teldu. Tað kunnu vera fleiri vaksin í einum húsi, børn og ung í húsinum ella onkur uttanfyri húsið, sum lænir telduna.

- Men verður teldan misbrúkt, er vandi altíð fyri, at hamarin fellur yvir tann, sum eigur telduna.

Per Skov Christensen staðfestir, at tað, sum fólk eiga at læra av hesum, er, at tann, sum eigur eina teldu, skal ansa ómetaliga væl eftir, hvør sleppur framat henni at brúka hana.

Men fyri at tryggja seg fyri misbrúki er eisini neyðugt, at tey, sum hava tráðleyst internet, ansa væl eftir at hava loyniorð á internetinum fyri at forða fyri, at óviðkomandi sleppa framat tí tráðleysa sambandinum.

## Eisini fartelefonir

Men hetta er ikki nakað, sum er sermerkt fyri internetið einsamalt.

Per Skov sigur, at tann, sum dulnevndur vil vera ónærisligur ímóti øðrum við fartelefonina, kann keypa sær eina bíliga telefon og eitt talitíðarkort undir onkrum følskum navni. So ber til at brúka telefonina til ágang ímóti øðrum og so tveita telefon og kort burtur aftan á.

- Fartelefonin er sum ein bilur, har simkortið er nummarplátan og IMEI-nummarið er stellnummarið. Men tað ber til at skifta simkortið út so ofta ein vil, uttan eftirlit.

Per Skov Christensen kundi onkusvegna hugsað sær, at betri eftirlit var, tá ið fartelefonir og simkort verða keypt.